UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

*Mál nr. 24/27238*

# Vegleiðing

*til kommunur at fylgja, tá umbøn um góðkenning av broyting í* ***byggisamtykt*** *verður send Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar sambært § 4 løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir*

Tá kommuna sendir umbøn til Umhvørvismálaráðið um góðkenning av broyting í byggisamtykt, er neyðugt at niðanfyri nevndu skjøl og upplýsingar fylgja við umbønini í hesi røð:

1. Avrit av seinast áteknaðu byggisamtykt.

2. Frágreiðing um hvørja einstaka broyting í verandi byggisamtykt, sum ætlanin er at gera og grundgeving fyri, at broytingin er neyðug, skynsom og hóskandi út frá byggisamtyktarligum heildaratlitunum í kommununi.
   2.1. Frágreiðingin og grundgevingarnar, nevndar í pkt. 2, mugu vera neyvt tær somu, sum standa í uppskotinum um broyting í byggisamtyktini, sum kommunustýrið hevur samtykt.
   2.2. Frágreiðingin og grundgevingarnar, nevndar í pkt. 2, mugu vera neyvt tær somu, sum eru lagdar fram til alment eftirlit sambært § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

3. Úrrit úr gerðabók frá kommunustýrisfundi, sum gevur eina fullfíggjaða mynd av politisku viðgerðini, sum uppskotið hevur fingið til og við at broytingin var samtykt av kommunustýrinum.

4. Avrit av kunngerð sambært § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, og frágreiðing um, nær og hvar kunngerðin hevur verið lýst.

5. Yvirlit yvir øll hoyringarskriv, sum kommunan hevur fingið rættstundis í sambandi við almenna eftirlitið.

   NB: Øll hoyringarskriv, sum verða send kommununi, í sambandi við almenna eftirlitið sambært § 6, stk. 1, skulu leggjast fyri kommunustýrið til viðgerðar og støðutakan.

6. Úrrit úr gerðabók frá kommunustýrisfundi, sum gevur eina fullfíggjaða mynd av politisku viðgerðini, sum skriv, innkomin í sambandi við almenna eftirlitið, hava fingið.

7. Avrit av øllum svarskrivum frá kommununi til skriv, innkomin í sambandi við almenna eftirlitið.

   NB: Øll innkomin skriv skulu viðgerast og svarast sum hoyringarskriv sambært vanliga fyrisitingarrættinum. Tað merkir, at kommunustýrið ítøkiliga og sakliga skal viðgera og taka støðu til tað, sum ført verður fram í einstaka skrivinum, og, um tað er viðkomandi, grundgeva sakliga fyri, hví kommunustýrið ikki tekur undir við innkomna mótmælinum ella broytingaruppskotinum.

   Tá kommunustýrið viðgerð innkomin mótmæli og broytingaruppskot, má kommunustýrið hava somu fyrilit í viðgerðini, sum kommunustýrið hevði, tá kommunustýrið viðgjørdi og samtykti at broyta byggisamtyktina.

   Førir viðgerðin av hoyringarskrivum til, at kommunustýrið broytir upprunaligu grundgevingarnar fyri uppskotinum, samanber við pkt. 2.1 og 2.2, ella førir kommunustýrið fram nýggjar grundgevingar fyri uppskotinum, má broytta uppskotið leggjast fram til alment eftirlit av nýggjum sambært § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir við eftirfylgjandi viðgerð, sum ásett í hesi vegleiðing, áðrenn Umhvørvismálaráðið kann taka støðu til góðkenning.

8. Byggisamtykt, sum er dagførd samsvarandi uppskotinum um broyting í byggisamtyktini, sum kommunustýrið hevur samtykt.

   8.1. Í byggisamtyktini, sum verður send Umhvørvismálaráðnum at áteknað, mugu ongar aðrar innihaldsligar broytingar verða gjørdar í mun til seinast góðkendu byggisamtykt, enn tær, sum kommunan biður Umhvørvismálaráðið um at góðkenna.

   8.2. Hóast ásetingina í pkt. 8.1 kann møguligt innihaldsyvirlit og síðutøl vera dagførd samsvarandi broytta tekstinum.

   8.3. Er tørvur á øðrum broytingum ella rættingum í byggisamtyktini, mugu hesar gerast sambært ásetingunum í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Umhvørvismálaráðið 20.01.2024

**Hilmar Høgenni**
*deildarstjóri*